# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*– Faktum er eisini, at Jóannes Patursson, ikki bert einaferð, skrivaði í norska fascistavinarliga tíðarritinum Norsk Årbog. Jóannes Patursson visti um linjuna í hesum riti.*

ROLF GUTTESEN

## Stjórnarlóg – sjálvandi!

Tær nýtist hvørki at vera løgfrøðingur ella politikkari fyri at staðfesta, at verandi stýriskipanarlóg ikki riggar. Henda nú galdandi lóg er alt ov fírkantað og læsir allar partar í politisku skipanini. Tað er tí í tøkum tíma, at Føroya fáa eina nýggja stjórnarlóg. Men hetta er sjálvsagt ikki høvuðsorsøkin til, at vit skulu hava eina stjórnarlóg. Føroyar eru eitt land og Føroya fólk eru ein tjóð. Tí skulu vit hava okkara egnu stjórnarlóg.

Stjórnarlógin verður okkara grundlóg, hóast heitið verður eitt annað. Tað er einki, sum forðar okkum í at hava okkara egnu grundlóg, hóast danska grundlógin er galdandi fyri alt ríkið. Henda danska grundlóg er fyri alt tað ikki meira galdandi enn so, at vit, eitt nú, kunnu loysa frá Danmark, um føroyski veljarin skuldi ynskt slíka loysn. Danska grundlógin er frá eini heilt aðrari tíð og er púra óhóskandi á summum økjum, tí kann tað bert vera gott við eini føroyskari stjórnarlóg.

Núgaldnandi stýriskipanarlóg fekk í síni tíð onga veruliga viðgerð. Lógin er eitt embætismannaverk, sum var meira ætlað sum eitt politiskt upplegg enn sum eitt liðugt lógarverk. Hetta er ein orsøkin til, at lógin er so fírkantað og fundamentalistisk, at hon meira ella minni blokerar fyri einum tøttum og fruktagóðum samstarvi millum løgting og landsstýri. Hartil kemur, at galdandi stýrisskipanarlóg tykist flyta vald frá løgtingi til landsstýri, og er hon sostatt eitt demokratiskt afturstig. Hvussu so er og ikki, so er vanlig semja um, at løgtingið er nógv viknað og landsstýrið og embætismannaveldið eru nógv styrkt, síðan henda løgna lóg kom í gildi fyri skjótt tíggju árum síðani. Tíð er nú til aðra og meira tíðarhóskandi og demokratiska stjórnarlóg, og tískil vóna vit, at løgtingið og Føroya fólk megna at fáa nýggja stjórnarlóg til vega. Vónandi fáa vit ta breiðu tjóðskaparligu semju, sum henda tilgongd krevur.

**Sosialurin**

# Hvat hevði Sundstein so at bera fram?

ROLF GUTTESEN



**Nú hevði eg væntað at fáa nakað nýtt at vita, tá sjálvur Jógvan Sundstein trívur í pennin, og fer at rættleiða meg um ymiss viðurskifti um Jóannes Patursson. Jógvan, fyrrverandi Føroya Løgmaður og formaður í Fólkaflokkinum hevur jú eitt langt og aktivt lív verið frammalaga í sama flokki, sum Jóannes Patursson var uppi í, í síni tíð.**

Men eiðasørt. Her kemur einki nýtt fram. Og ikki ein setningur í tí eg havi skrivað, kann hann dementera ella vísa aftur. Eks-løgmaðurin brúkar bara pláss uppá ábendingar um at eg vil ”niðurgera” JP og havi ”haturskenslur” móti honum.

So er ikki. Eg haldi tvørturímóti, at JP er ein sera áhugaverdur persónur í sínum samansetta kompleksiteti. Men ein partur av hesum kompleksiteti letur til at vera burturgloymdur ella goymdur av nógvum í dag.

### Trúðarsetningar sum prógv?

Her nýtta trúðarsetningar einki. Tað nyttar einki at ”prógva” við gomlum talumátum, sum: *”Tað skerst jú ikki burtur, at høvuðsorsøkin til alla framgongd í Føroyum hevur verið sjálvstýris- og sjálvbjargnishugsjónin. Her var Bóndin jú ein høvuðspersónir…”* Hatta vísir nakað um eina nokkso grunna søguvitan hjá JS.

Hesin Bóndin var – til dømis – ein høvuðspersónur í stríðnum ímóti, at ognarleys fingu jørð sum traðarmenn. Hann arbeiddi politiskt ímóti traðarmonnum, sum royndu at lívbjarga sær við einum hálvum ella heilum kúfóðri. Les tað, sum JP skrivaði og talaði um ”gráubók”. Hetta hevur hann eisini skrivað um í fascistavinarliga ”Norsk Årbog”. Hann kallar traðirnar fyri: *” eit revolusjonerande indgrip i dei rettar som jordbrukarne hadde havt frå norsketidi av etter lov og sedvane*” Hetta er eingin framburðsmaður, sum skrivar. Hetta er Junkarin, góðseigarin, miðaldarleivdin, ein stokk-konservativur politikkari..

### Herðaklapping í ”sjálvstýrisrørsluni”

Annars, at ”øll framgongd í Føroyum” er komin frá sjálvstýrishugsjónini, vísir eina tankagongd, sum er djúpt sjálvforherligandi, egocentrisk og skeiv.

Hvaðani er vælferðarsamfelagið komið? Ikki frá Fólkaflokkinum. Og enn minni Jóannes Patursson eigur lut í tí. Tað skuldi verið óneyðugt at nevnt flokk og persón, sum var kraftin og dynamo í hesum.

Mín vurdering er, at uttan tær fyrstu vælferðarlógirnar, sum blivu gjøgnumførdar síðst í 50-unum, hevði Føroyska samfelagið upp á allar mátar verið lítið í dag. Men, sum sagt ein vurdering. Onnur kunnu hava aðrar vurderingar.

JS ”trýr” (aftur ein trúðarsetningar) heldur ikki at H. J. Debes hevur forvanskað søguna um JP. Hartil er bert at svara, at mín gamli vinur H. J. Debes ikki hevur skrivað alla søguna.

### Er JS púra óvitandi?

Sundstein skrivar: ”So kemur ein kryptisk (gátufør; rg) viðmerking um, at JP ikki var einsamallur.” Nei, sum nevnt vóru hetta ár har fascisman blómaði í Europa. Men er JS óvitandi um, at persónar høvdu nazi-sympatiir, eisini í hansara flokki? Tað kann ikki passa!

### Faktum est!

Faktum er framvegis – at JP hevði norska nazistin Adolf Hoel sum gest og agitator í Føroyum. JP visti at Hoel var nazistur.

Faktum er eisini – at JP, ikki bert einaferð, skrivaði í norska fascistavinarliga tíðarritinum Norsk Årbog. JP visti um linjuna í hesum riti.

### Søgan verður ongantíð liðug

Hetta eru bert tvey faktuel ting, sum eru framløgd, og sum lýsa ein part av kompleksitetinum í Jóannesi Patursson. Fýra menn, Jacobsen, Mohr, Vang og Sundstein, sum ikki dáma at fáa ”keðilig” søgulig fakta fram, hava nú tikið til orðanna. Eingin hevur so mikið sum roynt at mótprógvað ella argumentera ímóti tí lítla, sum er framlagt! Felags er, at allir halda at hetta er skrivað í ”illsinni” ella ”blindari øði.” So er slett ikki.

Tað var meiri ein undran á manglandi fornemilsi av proportiónum og søguligari vitan. Nú hetta er farið framvið, undrist eg enn meir. Eg undrist kanska minst á tað, sum hesir fýra hava skrivað. Kanska meira á tøgnina annars. Eg respekteri teirra sjónarmið, men eri ikki samdur.

## Rætting

Tíverri var endin burtur í greinini hjá Dánial á Dul Jacobsen, sum varð prentað í blaðnum á gjár. Síðsti setningur í greinini skuldi verið soljóðandi:

»...Tá samfelagið lá í skeljasorli og fiskaloysi valdaði í fleiri ár, útlitini vóru av teim ringastu, tá sameintust tey í Føroyum, sum trúgva, at bøn er til stóra nyttu, og uttan at nakar vísindamaður tá var førur fyri at greiða frá, hvat hendi, so vendist fiskaloysið til fiskiríkidømi. Restin er søga. Jú, bønin er til stóra nyttu.«

Vit biða greinskrivaran umbera okkum mistakið.

**blaðstj.**

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.